# Hava lovað at knúsa okkum

**Kappingin um føroyaflúgvingina harðnar alsamt. Nevndarformaðurin í Faroe Jet sigur nú, at Atlantic Airways hevur beinleiðis lovað at knúsa Faroe Jet. Málið er nú tikið upp á hægsta politiska stigi**

LOFTFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Atlantic Airways hevur beinleiðis lovað at knúsa Faroe Jet.

Hetta avdúkaði nevndarformaðurin á Faroe Jet á landsfundi Fólkafloksins leygardagin.

Knút Lútzen gav fundinum eina drúgva frágreiðing um støðuna ímillum teir báðar kappingarneytarnar í luftini, Faroe Jet og Atlantic Airways og serliga fanst hann hvassliga at Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, fyri ikki at taka neyðug stig, so at Faroe Jet kundi yvirliva.

Og hann gjørdi eisini greitt, at skuldi Faroe Jet yvirliva, skuldi okkurt henda.

Hann upplýsti fyri teimum 60 áhoyrarunum, at nú var ikki nógv eftir av teimum 25 milliónunum, sum Faroe Jet hevði á kistubotninum, tá ið teir byrjaðu og at tað mátti okkurt henda her og nú.

- Hendir onki her og nú, hava vit aftur monopol á rutuni, segði hann.

### Hava lovað at knúsa okkum

Men hann vísti eisini á, at noyðist Faroe Jet at gevast, hevur Atlantsflog fingið sín vilja.

*Jeg har en mission, det er at knuse Faroe Jet. Vi mister mange penge nu, i mister mange penge, vores kasse er større en jeres. Når i går nedenom og hjem, så lukker vi hullet og så tjener vi pengene ind igen og så er der ikke nogen anden der tør starte op igen.*

Sambært Knút Lútzen, nevndarforman í Faroe Jet, er hetta orðarætt tað, sum marknaðarleiðarin í Atlantic Airways hevur sagt við stjóran og og eitt starvsfólk í Faroe Jet



*- Atlantic Airways hevur beinleiðis lovað at knúsa Faroe Jet, fortaldi nevndarformaðurin, Knút Lútzen á landsfundi fólkafloksins leygardagin. Landsstýrismaðurin í vinnumálum tekur málið í størsta álvara og hevur biðið nevndarformannin í Atlantsflogi kanna málið. Og er úrslitið at skuldsetingin er røtt, skulu neyðug stig takast*

Hann staðfesti, at tað var eitt miðvíst mál hjá Atlantsflog at knúsa Faroe Jet.

- Tað hevur marknaðarleiðarin í Atlantsflogi, Kent Christensen beinleiðis gjørt greitt fyri stjóranum og einum starvsfólki í Faroe Jet, fortaldi Knút Lútzen á landsfundinum.

Faroe Jet gjørdi sostatt ikki mætari enn at boðað Vinnumálaráðnum frá framferðini hjá Atlantsflogi.

Bjarni Djurholm gjørdi púra greitt, at hann tók hetta í størsta álvara.

- At knúsa ein kappingarneyta, er ikki ein politikkur, sum eitt alment partafelag skal standa fyri, segði hann.

Og hann gjørdi skjótt av, tí longu í gjáramorgun, var Christian Andreasen, nevndarformaður í Atlantic Airways, boðsendur á fund í vinnumálaráðnum

- Á fundinum fekk nevndarformaðurin boð um at kanna málið og er hald í skuldsetingunum ímóti Atlantsflogi, skal hann taka neyðug stig, sigur Bjarni Djurholm.

Hvørji tey neyðugu stigini eru vil Bjarni Djurholm ikki siga.

- Tað mugu nevndin og stjórnin í Atlantsflogi finna út av.

### Uttan fyri sømiligt mark

Bjarni Djurholm sigur, at eru tað rætt, at Atlantsflog hevur lovað at knúsa Faroe Jet, er tað stak óheppið.

- Men eg havi biðið nevndarformannin í Atlantic Airways at kanna málið, tí er hetta rætt, er tað uttan fyri alt sømiligt mark.

- Tað, sum marknaðarleiðarin í Atlantic Airways skal hava sagt við stjóran í Faroe Jet, er ikki eitt orðaval, sum kann góðtakast.

Bjarni Djurholm sigur, at nevndarformaðurin í Atlantic Airways var samdur í hesum og hann frábað sær at verða samantvinnaður við eina slíka útsøgn.

Men at Atlantic Airways hugsar soleiðis, er tað í veruleikanum ikki bara enn rættur handilsskapur?

- Nei, tað er tað ikki. Rættur handilsskapur er sunn kapping. Tað kann ikki góðtakast, at tað verður eitt endamál í sær sjálvum at beina fyri einum kappingarneyta.

- Tí havi eg biðið nevndarformannin í Atlantsflogi kanna málið, tí er hetta satt, er hetta uttanfyri alt mark, sigur Bjarni Djurholm.

## Virka undir givnu karmunum

Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways, tykist ikki at taka sær serligt tikni av atfinningunum, sum í gjár komu frá nevndarformanninum í FaroeJet.

Hesin segði millum annað, at Atlantic í dag ikki virkar fyri at forvinna pening, men einans fyri at rudda FaroeJet av vegnum, soleiðis at eingin kappingarneyti aftur fer at royna seg á Føroyarutuni.



- Flogferðsla snýr seg ikki einans um at forvinna pening. Men eg haldi, at ein og hvør, sum dugir at lesa ein roknskap, sær, at Atlantic hevur roynt at hava ein sunnan rakstur nú í nógv ár.

- Hesi árini hava vit altíð virkað undir teimum karmum, sum eru givnir, og fyri okkum hevur tað ikki havt týdning, um kappingarneytin hevur itið Maersk, DAT ella FaroeJet, er einasta viðmerkingin, sum Magni Arge hevur í til útsagnirnar, sum í gjár vórðu førdar fram.

**-mørk**

## Sigur lítið um skuldsetingar

Marknaðarleiðarin hjá Atlantsflogi hevur lítið at siga um skulædsetingar frá Faroe JEt.

Kent Christensen, nevndarformaður í Atlantsflogi, er ógvuliga fáorðaður um um uppáhaldið hjá Faroe Jet um, at hann skal hava lovað at knúsa Faroe Jet.

Hvat eg møguliga havi sagt í veitslulagi onkustaðni, havi eg ongar viðmerkingar til. Hevur Faroe Jet hug at endurgeva slíkt, má tað standa fyri teirra rokning.

Men hann leggur afturat, at hann er settur í starv hjá Atlantsflogi og hann roynir at røkja áhugamálini hjá Atlantsflogi so væl, sum tilber.

- Meiri havi eg ikki at siga um hetta.

Hevur tú hoyrt frá nevndarformanninum í Atlantsflogi um hetta málið.

- Vit arbeiða báðir fyri somu fyritøku, so vit tosa alla tíðina um tað, sum fer fram, er stutta- og einasta - svarið frá Kent Christensen.

**-Áki-**

# Biðjur landsstýrið flúgva við Faroe Jet

**- Eg havi tikið tað heilt óvanliga stig at heitt á almennu umsitingina um at brúka Faroe Jet, har tað ber til, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður**

LOFTFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Er tað nakar, sum vil varðveita Faroe Jet, er tað eg.

Bjarni, landsstýrismaður í vinnumálum sigur, at tað er ongin heitari talsmaður fyri kapping í føroyaflúgvingini enn hann sjálvur.

Tí er hann ikki samdur í atfinningunum frá Faroe Jet, tá ið sagt verður, at tað almenna ger alt ov lítið fyri at stuðla nýggja flogfelagnum.

- Í sambandi við Faroe Jet havi eg gjørt nakað, eg ongantíð havi gjørt fyrr. Og tað er at handa øllum landsstýrismonnum skriv, har eg heiti á teir og teirra aðalráð um at brúka Faroe Jet, har tað yvirhøvur ber til, ikki minst Almanna- og heilsumálaráðið, ið flýgvur nógv við sjúklingum.

Men ein vansi við Faroe Jet er, at fráferðirnar passar illa til almennan flutning.

- Felagið flýgur á miðdegi, men Atlantsflog flýgur um morgunin og heim um kvøldið og tað avmarkar møguleikarnar at brúka Faroe Jet.

Hann vísir í hesum sambandi á, at Fíggjarmálaráðið hevur álagt almennum starvsfólki, at tá ið tey fara uttanlands, skulu tey fara um morgunin og koma aftur um kvøldið, har tað yvirhøvur ber til, fyri at spara gisting uttanlands.

- Hetta avmarkar møguleikarnar at brúka Faroe Jet, tí vit kunnu ikki áleggja umsitingini at brúka eina dýrari loysn enn neyðugt.

Annars staðfestir Bjarni Djurholm, at størsta aktiv í flogferðsluni er, at vit hava fingið eitt flogfelag afturat.

Hann staðfesti eisini at Vinnumálaráðið brúkti Faroe Jet, tá ið tað yvirhøvur læt seg gera.

Men hann staðfesti eisini, at ein fortreyt fyri kapping á økinum, er, at Atlantsflog verður einskilt.

- Tilgongdin at einskilja Atlantsflog byrjaði áðrenn nakar hevði hoyrt um Faroe Jet.

- At vanlukkan á Stord so elvdi til, at stígur kom í enskiljingina, er ein onnur søga, men tað kunnu politikarar ikki lastast fyri.

Bjarni Djurholm sigur, at møguleikarnir at stýra loftferðsluni, eru avmarkaðir.

- Innan loftferðslu hava vit onki, sum minnir um fjarskiftiseftirlitið á fjarskiftisøkinum og tí hava vit ongan myndugleika, sum kann áleggja Atlantsflogi at bera seg at á ein ávísan hátt.

Tí helt hann, at atfinningarnar frá Faroe Jet ímóti almenna myndugleikarnum, eru ósakligar.

Tað eydnaðist hvørki at fáa eina viðmerking frá nevndarformanninum alla marknaðarleiðaranum í Atlantsflogi, áðrenn blaðið fór til prentingar